# Vinnunevndin tekur undir við færri fiskidøgum

Meirilutin í Løgtingsins vinnunevnd mælir til at skerja fiskidagarnar tvey prosent, og at dagarnir á Bankanum verða 15 prosent færri Meirilutin, sum eru umboðini hjá samgonguflokkunum, eru eisini samdir um, at øll vinnulig veiða við línu inni á firðum og sundum út á ein fjórðing úr landi verður bannað í mai, juni og juli. Men samgonguumboðini taka hinvegin ikki undir við at banna øllum fiskiskapi tvær vikur um ólavsøkuna og tvær vikur á jólum, soleiðis sum Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, ætlar. Meirilutin heldur, at bannið eigur at vera frá 20.apríl og 14 dagar fram, tá gýtingin er liðu, og tey mæla frá at dagar, sum verða brúktir til at fiska gulllaks, verða tiknir av fiskidøgunum. Tjóðveldisflokkurin í vinnunevndini mælir til at skerja fiskidagarnar fýra prosent og dagarnar á Føroya Banka 25 prosent. Flokkurin mælir eisini til at stytta veiðutíðina á Føroya Banka og umhugsa at steðga øllum fiskiskapi har í eitt ella tvey ár.



*- Vit eru altíð tveir mans á vakt í vikuskiftinum, men hetta vikuskiftið hevur verið stak friðarligt í oynni, sigur Jóhannus Magnussen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Friðarligt vikuskifti í Suðuroy

**SUÐUROY**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Jóhannus Magnussen, løgreglumaður í Suðuroy, sigur, at hetta vikuskiftið hevur verið stak friðarligt í oynni.

- Her hevur einki verið, og boð hava ikki verið eftir okkum til nakrar uppgávur av týdningi, sigur hann.

Hann heldur ikki, at tey nógvu tiltøkini hava verið í oynni í vikuskiftinum, men tiltøk hava kortini verið í TB-húsinum og í Gamla Pakkhúsi í Vági.

- Vit eru altíð tveir mans á vakt í vikuskiftinum, oftast ein útbúgvin løgreglumaður og ein eykamaður, sigur Jóhannus Magnussen.

# Føroya Banki góða fra

**Í dag skipaði Føroya Banki fyri tíðindafundi, har leiðslan legði fram hálvársútslit bankans, sum er munandi betri fyrra hálvár í ár enn somu tíð í fjør**

**FØROYA BANKI**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroya Banki hevði eitt munandi betri hálvár í ár, enn bankin hevði somu tíð í fjør. Avlopið fyri skatt er 102 miljónir krónur móti 46 miljónum krónum fyrra hálvár í fjør.

Á tíðindafundi í dag fingu vit at vita, at netto rentu-og tænastuinntøkur bankans eru 155,7 miljónir krónur higartil í ár móti 129,3 miljónum krónum somu tíð í fjør.

Eginogn bankans er nú 1.330 miljónir krónur og solvensurin, sum hevur verið minkandi, er nú 20,8 prosent.

Hetta er fyrsti almenni hálvársroknskapurin hjá Føroya Banka, síðan bankin er vorðin skrásettur á virðisbrævamarknaðinum.

## Forstjórin fegnast

- Vit fegnast um, at vit kunnu vísa á eitt væl betri úrslit fyrra hálvár í ár enn fyrra hálvár í fjør.

Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka sigur, at betraða lønsemi av rakstrinum er til gagns fyri partaeigarar bankans.

Á tíðindafundinum í morgun vísti hann á, at avlopið eftir skatt higartil í ár er 40,2 miljónir krónur. Í fjør var avlopið einans 13,2 miljónir krónur eftir skatt.

Forstjórin vísti eisini á, at útlán bankans vóru 6,2 miljardir krónur fyrra hálvár í ár, og at vøksturin í útlánunum í hesum halvari hevur verið 833 miljónir krónur.

- Innlán bankans eru 4,9 miljardir krónur við endan av juni mánaða, og innlánini vuksu fyrra hálvár við 203 miljónum krónum.

Fíggjarjavnin hjá Føroya Banka er nú 7,8 miljardir krónur.

## Nýggir partaeigarar

Føroya Banki varð skrásettur á virðisbrævamarknaðunum í Íslandi og Danmark 21. juni í ár, og samstundis sum tveir triðingar av bankanum vórðu einskildir.

Við skrásetingini og einskiljingini fekk Føroya Banki umleið 15.000 nýggjar partaeigarar.

- Vit vænta eitt ársúrslit í ár, sum verður millum 145 og 165 miljónir krónur fyri skatt og burturleggingar.

Forstjórin, Janus Petersen, sigur, at hetta er sama forsøgn, sum bankin hevði í samband við roknskapin fyri fyrsta ársfjórðing í ár.



*- Vit vænta eitt ársúrslit í ár, sum verður millum 145 og 165 miljónir krónur fyri skatt og burturleggingar – og soleiðis heldur forsøgnin, sigur forstjórin í Føroya Banka, Janus Petersen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Onnur skip borið við Flesjarnar

**Sosialurin hevur skilt, at tað eru fleiri enn fýra skip, sum hava borið við botn á Flesjunum síðan 1950**

**FLESJARNAR**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í sambandi við, at Olshana herfyri fórst á Tangafirði, hevur verið sagt, at fýra skip tilsamans hava siglt á Flesjarnar síðan 1950. Eisini hevur verið sagt, at trý av hesum skipum eru endað á havsins botni.

Men umframt enska farmaskipið Barjama, sum sigldi á Flesjarnar á sumri í 1950, Góðanes, sum fórst nøkur ár seinni og farmaskipið Ólavur Gregersen, sum fórst í 1984, er okkum sagt, at minst tvey onnur skip hava siglt á Flesjarnar.

Sosialurin hevur fingið upplýst, at veitingarskipið North Star hjá Thor í Hósvík eisini hevur borið við Flesjarnar, eins og Sundabúgvin hevur borið við botn á hesum leiðum.

Bæði North Star og Sundabúgvin komu tó avaftur – og endaðu soleiðis ikki við havsins botn.

Ein maður, sum Sosialurin hevur tosað við, veit eisini at siga, at onkur nótabátur hevur borið við botn á Høgnaboða – uttan, at hetta tó førdi til skipsbrot.



*Okkum er upplýst, at North Star (mynd) og Sundabúgvin eisini hava borið við botn á Flesjunum – uttan tó, at hetta førdi til skipsbrot*

*Mynd: Skipalistin.ta*